gult2 cyan2 magenta2 svart2



## NØVN Í VIKUNI

### Heðin Mortensen 55



Seinasta leygardag, 7. apríl, gjørdist Heðin Mortensen, lø gtingsmaður Sambandsfloksins, 55 ár.

Heðin Mortensen er sonur Ethel og Martin Eliesar (Eli) Mortensen úr Trongisvági. Heðin er føddur á Tvøroyri, men tey fluttu til Havnar, tá Heðin var unglingi.

Heðin Mortensen er útbúgvin maskin- og bilsmiður, og lærdi hann hjá Wenzel Petersen í Havn. Í 1978 fór Heðin Mortensen at starvast sum bilsýnsmaður hjá Tryggingarsambandinum Føroyar. Seinastu árini hevur hann tó starvast á marknaðardeildini hjá Tryggingarsambandinum, sum nú eitur Tryggingarfelagið Føroyar.

Heðin er giftur Hjørdis, sum er dóttir Eriku og Alfred Egholm.

Heðin Mortensen var ungur valdur í Tórshavnar býráð í 1972 fyri Uttanflokkalistan hjá Peturi í Gongd. Hann umboðaði Uttanflokkalistan í býráðnum framtil 1988, tá hann lat seg stilla upp á listanum hjá Sambandsflokkinum, sum hann hevur umboðað í býráðnum síðani.

Av álitisstørvum í býráðnum í Havn kunnu nevnast, at hann var 2. býráðsnæstformaður 1980-84 og frá 1997-, formaður í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs 1982-84 og frá 1988-97, formaður í sosialu nevnd Tórshavnar býráðs 1998-1999 . Frá 1999- formaður í byggi- og býarskipanarnevnd Tórshavnar býráð.

Umframt tað er hann eisini forseti í Ítróttarsambandi Føroya, og hevur hann verið tað síðan 1980. Hann hevur verið umboðs ráðslimur í SEV frá 1973 og stýrislimur í SEV frá 1993-1997.

Frá 1. januar 2001 varaborgarstjóri í Tórshavn, næstformaður í fíggjarnevndini, formaður í mentanarnevndini, og byggi- og býarskipanarnevndini.

Heðin Mortensen hevur nakrar ferðir stillað upp bæði til fólkatings- og løgtingsval fyri Sambandsflokkin, og við valið 30. apríl í 1998 varð hann valdur á ting. Árini 89, 90, 91 og 93 var hann varamaður á tingi í styttri tíðarskeið.

Hann er næstformaður í uttanlandsnevndini og limur í og mentanarnevndini.

Heðin Mortensen, sum er ein tann føroyingurin við flestu álitisstørvum í nógvum ymiskum nevndum, gjørdist riddari av Dannebrog 1991. Hann hevur fingið íslendskan ISI heiðurskross 1996 og føroyskan ÍSF heiðurskross 1999.


# Restaurant Hafnia
- spennandi páskamatskrá

Leygardag: opið frá kl. 18.00 - 21.30
Páskadag: opið frá kl. 12.00 - 21.30
2. Páskadag: opið frá kl. 12.00 - 21.30
*- stongt skírisdag og langa fríggjadag!*

1. og 2. páskadag frá kl. 12.00 - 17.00:
Klársuppa við bollum
Lambasteik við reyðkáli
Ísdessert
bert 158,-



*Gevið mammu/pápa frí á páskum - komið út og etið!*

A la Carte *frá kl. 12.00 - 21.30*

Forrættir
• Diskur við úrvali av fiski og skeljadjórum .............................*(68,-)*
• Roykt laksarósa við broysknum salati og purrleyksdressingi ..*(58,-)*
• Gratinerað øða við mousse av rækjum og jákupsskeljum .......*(70,-)*
***Afturvið er heimabakað breyð og smør***



Høvuðsrættir
• Heilstoktur lambaryggur við grønmeti, soðsós og rómabakaðum eplum ..*(175,-)*
• Neytatournedos við saute av soppum, rástoktum eplum og portvínssós ...*(185,-)*
• Pestokryddaðir havtaskubúffar við bosmatirísi og fiskaglace ....................*(175,-)*

Omaná
• Heimagjørd íslagkøka við fruktkompotti .........*(48,-)*
• Marengsreiður við úrvali av frískum fruktum ..*(68,-)*
• Sjokulátakøka borðreidd við appelsinsorbet .....*(68,-)*

3 rættir 275,-

(Børn undir 12 ár: ½ portión fyri ½ prís)

Búffar:
• Enskur búffur v/ bleytleyki, soðsós, kókaðum eplum og agurkusalati ...............160,-
• Franskur búffur v/ persillusmøri. Borðreiddur við pom. frites og grønmeti ......165,-
• Flamberaður piparbúffur borðreiddur við piparsós og grønmeti ......................195,-

Barnamenu:
• Veljið millum høsnarunga, fisk ella pylsur v/ pom frites
• Omaná: Kúluísur v/ vaflum

2 rættir 59,-

*Øll børnini fáa páskagávu!*

HVØRT KVØLD:
STÓR PÁSKABUFFET
(um kvøldið frá kl. 18.00)



Alskyns páskarættir bæði kaldir og flógvir, ostaborð og dessertúrval.
bert 185,-

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33

HOTEL HAFNIA


## Nógv tiltøk á Torginum í SMS hesa vikuna

TÍÐINDASKRIV
*SMS*

Í gjár lótu ikki færri enn tríggjar framsýningar upp á Torginum í SMS. Smyril Line og VR-Bilar hava sølframsýningar, meðan 3'arin og SMS hava forkunnuga myndaframsýning frá Prix Føroyar finaluni í 1999.

Smyril Line, sum seinnu árini hevur havt søluframsýning í SMS, verður á Torginum til mikudagin. Á básinum hjá sær bjóða teir nógv góð og spennandi ferðatilboð, bæði sjó- og loftvegis. Teir hava eisini eina rúgvu av ferðavinnumálum og gistingarmøguleikum annars, at bjóða á søluframsýningini. Eisini hevur Smyril Line sertilboð á Torginum nevndu dagarnar. So tit, sum hava ætlanir at ferðast í summar. –Vitjið básin hjá Smyril Line, og teir finna júst tí ferðina, tú leitar eftir.

**Nýggi Volvo S60 á Torginum**

Nýggjasta bilasølan í Føroyum, VR-bilar, sum alment lat upp um árskiftið, hevur framsýning á Torginum fram til leygardagin 14. apríl.

Teir hava tríggjar bilar á Torginum hesar dagarnar. Tann mest forkunnugi er tann spildurnýggi Volvo S60, sum júst er komin á marknaðin. Hesin bilurin er, av serkønum innan bilavinnuna kosin at verða snøggasti bilur av sínum slag.

Bilurin hevur eisini allar hugsandi hentleikar, so sum air-condition, leðursetur, fartpilot, ja alt hugsandi. Hinir báðir bilarnir, sum VR-bilar sýna fram eru ein Volvo S40 og ein Renault Clio.

**Forkunnug myndaframsýning**

Saman við 3'arinum hevur SMS eina ógvuliga forkunnuga myndaframsýning frá Prix Føroyar finaluni í Norðurlandahúsinum í 1999. Myndirnar hava starvsfólk hjá 3'aranum tikið. Myndirnar, sum ongantíð eru vístar alment áður, eru tiknar aftan fyri pallin, á pallinum, í salinum og ymsar aðrastaðni í Norðurlandahúsium undir finaluni í 1999. Á framsýningini á Torginum eru myndirnar bólkaðar til ávísu tónleikabólkarnar og eisini til áhoyrararnar.

So av tey umleið 600 áhoyrarunum í Norðurlandahúsinum hatta leygarkvøldið í apríl 99, eru tað helst eru fleiri, sum kunnu síggja seg sjálvan aftur á myndaframsýningini í SMS, sum verður opin til leygardagin 21. apríl.

## Tøkk

Til øll tykkum sum mintust meg, á mínum 80 ára føðingardegi, við gávum, blómum, telegrammum og uppringingum.

Eisini eina stóra tøkk til tey, sum hjálptu og gjørdu dagin so hugnaligan.

Tøkk til tey, sum vaktu meg um morgunin við sangi.

*Heilsan*
**Olevina Joensen, Nólsoy**

gult3 cyan3 magenta3 svart3




